## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av landsynningi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og út á seinnapartin regn. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

# Fólkatónleikur við útlendskum bólkum



*Bólkurin Cullivoe Fiddlers av oynni Yell í Hetlandi fer at spæla á fólkatónleikarstevnuni, sum verður í næstu viku. Skráin er fjølbroytt og spennandi*

**Frá 16. juli til 20. juli skipar Føroya Fólkatónleikarafelag fyri tónleikarstevnu við nógvum áhugaverdum føroyskum og útlendskum nøvnum. Eisini er spennandi konsert á Gøtusandi á skránni**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Á stevnuni hesuferð verða bólkarnir Cullivoe Fiddlers úr Hetlandi, Færd úr Danmark og Bretlandi, duoin Desislava Dimcheva og Valeri Dimchev úr Bulgaria. Harumframt vera Niels Midjord, Helgi Midjord, Denise Andersson og Spælimenninir úr Føroyum.

### Útikonsert á Gøtusandi

Um tað viðrar verður eisini ein rokk- og fólkatónleikakonsert á Gøtusandi tann 19. juli. Konsertin er fyriskipað í samstarvi millum Fólkatónleikarstevnuna og samtakið Grót. Á hesi konsertini vera bólkarnir Clickhaze, Enekk, M.C. Hár, Dimchev duoin og einstaklingarnir Hanus G. Johansen og Søren Søgaard.

Skráin fyri hesi tónleikastevnuni sær tískil sera spennandi út, og konsertin á Gøtusandi er tað stóra tiltakið hesuferð. Har fer áhoyrarin at uppliva nýmótans rokktónleik og traditionellan fólkatónleik á somu konsert.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 11 |
| Nuuk | |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | 20 |
| Halifax | 16 |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 18 |
| Tromsø | 15 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 24 |
| Helsinki | |
| Moskva | 22 |
| Berlin | 31 |
| Warzawa | 28 |
| Kiev | 30 |
| Bukarest | |
| Paris | 19 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 31 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 14 |
| New York | 32 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | |
| Buenos Aires | 8 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1000 hPa millum Skotlands og Suður-Noregs fer í útnyrðing og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1000 hPa vestan fyri Skotland grynnist eisini.




**Í dag:**
Lágtrýstið norðanfyri Føroyar fer norðureftir og lágtrýstið vestan fyri Skotland grynnist framvegis.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/07 kl. 06⁰⁰– 10/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,1°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 11,1°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 09/07 kl. 06⁰⁰– 10/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 6,3 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

11. juli: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11. juli | 08.14 | 20.41 | 07.14 | 19.41 | 07.29 | 19.56 | 10.14 | 22.41 | 11.14 | 23.41 | 06.29 | 18.56 |
| 12. juli | 09.06 | 21.32 | 08.06 | 20.32 | 08.21 | 20.47 | 11.06 | 23.32 | — | 12.06 | 07.21 | 19.47 |
| 13. juli | 09.56 | 22.21 | 08.56 | 21.21 | 09.11 | 21.36 | 11.56 | — | 00.32 | 12.56 | 08.11 | 20.36 |
| 14. juli | 10.44 | 23.07 | 09.44 | 22.07 | 09.59 | 22.22 | 00.21 | 12.44 | 01.21 | 13.44 | 08.59 | 21.22 |
| 15. juli | 11.31 | 23.56 | 10.31 | 22.56 | 10.46 | 23.11 | 01.07 | 13.31 | 02.07 | 14.31 | 09.46 | 22.11 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11. juli | 05.29 | 17.56 | 08.29 | 20.56 | 09.29 | 21.56 | 07.59 | 20.26 | 09.14 | 21.41 |
| 12. juli | 06.21 | 18.47 | 09.21 | 21.47 | 10.21 | 22.47 | 08.51 | 21.17 | 10.06 | 22.32 |
| 13. juli | 07.11 | 19.36 | 10.11 | 22.36 | 11.11 | 23.36 | 09.41 | 22.06 | 10.56 | 23.21 |
| 14. juli | 07.59 | 20.22 | 10.59 | 23.22 | 11.59 | — | 10.29 | 22.52 | 11.44 | — |
| 15. juli | 08.46 | 21.11 | 11.46 | — | 00.22 | 12.46 | 11.16 | 23.41 | 00.07 | 12.31 |

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

Original bosal Útstoyt



p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjørður
Tlf. 444405
Fax444629

Sera bíligt at LEIGA SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1
Tlf. 319544




5 707265 100043